# Mær gav sankta Mortan

Mær gav sankta Mortan
tjúgunda kvøldið jóla
tjúgu stútir, nú eru jólini úti,
nítjan kvígur,
nú munnu jólini liða,
átjan stakkar,
nú munnu jólini lækka,
seytjan kjólar
skar hann sínum dreingum til jóla,
sekstan hindir,
allar vóru blindir,
fimtan svanir,
allir vóru tranir,
fjúrtan ostar,
fullu so væl í tostar,
trettan húðir,
at tekja sínar búðir,
tólv dreingir, bæði við reip og streingir,
ellivu bukkar,
fullu so væl i tokkar,
tíggju tunnur bjór,
tað var teirra dreingja kór,
níggju langskip við rá,
átta gangarar grá',
gyltan saðil á,
sjey silvurskálir,
seks dúvur blá',
sótu mær íhjá,
fimm fæ og fýra fár,
trý flikki og tvær gæs,
ein fjøður av tí fugli,
ið væl kundi at fljúva.